# Skylda at skráseta eigarar.

Frá 1. februar 2022 er kravt, at øll kapitalfeløg – partafeløg, smápartafeløg, íverksetarafeløg og partnarafeløg, skulu skráseta sínar eigarar, bæði løgligar (beinleiðis) og veruligar. Harumframt skulu kommandittfeløg, og vinnurekandi grunnar eisini skráseta sínar veruligi eigarar.

Kunngerð um skráseting av eigaraviðurskiftum í kapitalfeløgum (*Kunngerð nr. 5 frá 19. januar 2022 um skráseting og almannakunngering av upplýsingum um eigarar í vinnufyritøkum í kt-skipan Skráseting Føroya*), https://logir.fo/Kunngerd/5-fra-19-01-2022-um-skraseting-og-almannakunngering-av-upplysingum-um-eigarar-i-vinnufyritokum-i var lýst 19. januar 2022.

Løgligir eigarar eru løgfrøðiligir ella likamligir persónar, sum hava ræði á 5 % ella meira av felagsins kapitalpørtum ella atkvøðurættindum.

Veruligir eigarar eru tann ella teir likamligu persónar, sum í síðsta enda eiga ella havi ræði yvir einum felag við beinleiðis ella óbeinleiðis ognarrætti yvir einum nóg stórum parti av ognarpørtum ella atkvøðurættindum ella sum hava ræði á annan hátt.

Ein nóg stórur partur merkir í útgangsstøðinum, at ein persónur hevur meiri enn 25 % av ognarpørtunum ella atkvøðurættindunum í felagnum. Hetta markið er ábending um veruligan ognarrætt.

Skráseting av veruligum eigarum kann vísa seg í trimum ymsum møguleikum:

- Felagið hevur veruligar eigarar
- Felagið hevur ikki veruligar eigarar
- Felagið kann ikki eyðmerkja sínar veruligu eigarar

Útgangsstøðið er, at felagið hevur veruligar eigarar og kann eyðmerkja teir. Í ítøkiligum førum kann tað tó koma fyri, at felagið ikki hevur veruligar eigarar, ella at tað ikki ber til at eyðmerkja veruligu eigararnar. Ikki fyrr enn allar royndir at eyðmerkja teir veruligu eigararnar eru troyttar, kann felagið nýta møguleikarnar 2 ella 3.

Tað er ábyrgdin hjá felagnum at eyðmerkja sínar veruligu eigarar og skráseta upplýsingarnar í kt-skipan Skráseting Føroya.

Skráseting Føroya hevur gjørt eina vegleiðing um, hvussu eitt felag skal skráseta sínar løgligu og veruligu eigarar. Vegleiðingin kann lesast á heimasíðuni.

Øll feløg skulu fylla út eitt fráboðanarskjal við upplýsingum um eigarar og senda til Skráseting Føroya til skrásetingar í seinasta lagi 1. september 2022.

Feløg, sum verða stovnað eftir 1. februar 2022 skulu senda fráboðanarskjalið inn í sambandi við stovnanina.

Skráseting Føroya · Sigmundargøta 13 · Boks 264 110 Tórshavn · Tlf.: +298356010 · Fax: +298356015 · E-mail: skr@skraseting.fo